LANDSVERK

Rættarnevndin

**23. mars 2018**

Journalnr. [123456]

# TUNLAR NORÐUR UM FJALL

Viðmerkingar til løgtingsmál nr. 81/2017

Landsverk varð saman við Samferðslumálaráðnum boðið á fund í Rættarnevndini 23. mars 2018 at gera viðmerkingar til lógaruppskotið um, at P/F Norðoyatunnilin skal fyrireika og gera nýggjar tunlar Norður um Fjall. Rættarnevndin heitti á Landsverk um eisini at senda viðmerkingarnar skrivliga.

**Ítøkilig verkætlan**

Landsverk undrast á, at uppskot fyriliggur um at fáa heimild til at fyrireika og forprosjektera eitt prosjekt, sum longu er gjørt og er klárt at bjóða út. Verkætlanin varð fyrireikað í árunum 2005-2007 og prosjekterað í 2010. Landsverk fekk dagførda kostnaðarmeting upp á tunlarnar Norður um Fjall í 2015. Hon er 360 mió. krónur. Estimeringin sum liggur við uppskotinum til løgtingslóg brúkar hesa somu upphædd. Um farið verður undir at fyrireika og prosjektera eitt annað uppskot til verkætlan, eitt nú har byrjað verður í Gerðabønum, er talan um eina heilt aðra fíggjarætlan fyri íløguna. Um ætlanin hinvegin er at halda fast í verandi uppskoti, er ikki neyðugt at fyrireika og forprosjektera, tí verkætlanin er klár at bjóða út. Tað er tí ógreitt, hvat uppskotið í veruleikanum snýr seg um.

## Yvirskipaðar viðmerkingar

Landsverk er prinsipielt ímóti, at verkætlanir, ið útbyggja landsvegakervið, verða lagdar uttan fyri Landsverk. Hesi seinastu 70 árini hevur Landsverk staðið fyri at planleggja, byggja og reka samlaða infrakervið í Føroyum, so tað hongur saman sum ein heild. Undirsjóvartunlarnir vóru tiknir burtur úr heildini fyri at kunna fíggja teir við beinleiðis brúkaragjaldi, men ætlanin var tá, at teir skuldu fella aftur til landið at reka og umsita, tá teir vóru útgoldnir.

Landsvegalógin (Løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir) sigur m.a., at landsvegirnir eru bygdavegirnir og vegir frá bygd til bryggju ella brúgv, ið *mest hava týdning fyri samferðsluna oyggjanna millum.* Hetta at knýta landið saman við einum tryggum og álítandi vega- og tunnilskervi er tí ein høvuðsuppgáva hjá Landsverki, og hon er munandi lættari at halda, tá hetta kervið er samanhangandi. Bæði viðvíkjandi planlegging, rakstri og ikki minst tilbúgving er tað umráðandi, at kervið ikki er sundurpettað til ymiskar eigarar og feløg at umsita. Eitt samanhangandi, einsháttað infrakervi við sama standardi er eisini best fyri tey

ferðandi, so tey ikki merkja, hvør nú umsitur hetta vegakervið, tey koyra á. Í Føroyum eru í dag áleið 500 km av landsvegi samanlagt. Tað átti ikki at verið neyðugt at petta hetta enn meira sundur.

Tað kann avlaga útbyggingarnar av landsvegakervinum, at tunnilsfeløgini fara at fíggja ymsar aðrar verkætlanir nær við, har undirsjóvartunlar eru. Nevnt verður í uppskotinum, at tunlar Norður um Fjall kann síggjast sum ein "leingjan" av Norðoyatunlinum, tí skal tunnilsfelagið gera hesa verkætlan. Vandi kann tá vera fyri, at íløgur í infrakervið ikki verða gjørdar eftir, hvar tørvurin er størstur, men heldur eftir, hvar verkætlanin liggur í mun til ein av undirsjóvartunlunum. Møguleikin, at Vágatunnilin kann fíggja ein tunnil í Vágunum, hevur eisini verið frammi í miðlunum.

Brúkaragjøld í sambandi við eina ávísa stóra íløgu kunnu vera eitt gott tiltak, men átti ikki at verið neyðugt í longdini til rakstur av íløguni. Landið fær árliga yvir 250 mió. krónur inn í landskassan frá skrásetingargjøldum á bilum og frá vegaskattinum. Bara ein lítil partur fer til rakstur og íløgur í infrakervið. Tað hevði verið skilagott at avgjørt heilt yvirskipað, hvat er ætlanin við avgjøldum og brúkaragjøldum, hvussu skal infrakervið landsins skipast í framtíðini, og tá ber ikki til bert at hyggja at einum øki, sum her í Norðoyggjum, men eftir øllum landinum sum eina heild. Tað er tað, vit hava ein stovn sum Landsverk til.

### At fyrireika og forprosjektera

Í uppskotinum verður nevnt, at P/F Norðoyatunnilin skal fáa rætt til at fyrireika og forprosjektera vega- og tunnilsgerð.

Til hetta kann viðmerkjast, at Landsverk hevur arbeitt við ymsum loysnum at gera nýggjar tunlar Norður um Fjall. Tríggjar loysnir vóru kannaðar nærri í 2005-07 og samanbornar við fyrimunum og vansum. Kostnyttukanningar vóru eisini gjørdar. Grundað á hetta mælti Landsverk til, at miðloysnin at gera nýggjar tunlar áleið har, verandi tunlar eru, verður vald. Hendan loysnin varð eisini samtykt í løgtinginum í 2009, og játtaðar vóru 2 mió. krónur til at fyrireika verkætlanina. Jarðfrøðiligar kanningar eru gjørdar, og verkætlanin er liðugt prosjekterað. Verkætlanin er klár at bjóða út, tá fígging fyriliggur, og neyðugt er ikki við fleiri fyrireikingum.

Um ætlanin er at velja eina aðra loysn, eitt nú at kanna møguleikan at venda aftur til loysnina har sunnari tunnilin, Árnafjarðartunnilin, kom út í Gerðabønum, so ber tað væl til. Loysnin varð vald frá tá, tí hon er væl dýrari (í dag mett til um 100 mió. krónur dýrari) og nyttan er áleið tann sama sum av loysnini, har tunlarnir liggja áleið har verandi tunlar eru.

Nevnast kann, at nógv størsti parturin av ferðsluni í verandi tunlum Norður um Fjall er ávegis til og úr Klaksvík. Bert ein lítil partur er á veg víðari til Norðoyatunnilin. Hetta kann tó broytast nakað, nú landið verður enn meira samanknýtt við Eysturoyartunlinum, men framvegis verður væntandi nógv ferðsla millum Klaksvík og økið norðanfyri.

Landsverk hevur bæði førleikan og skyldu til at planleggja óheft og fakligt. Tað vil siga at tryggja, at heildarmyndin verður varðveitt. Hetta kann við hvørt koma upp á tvørs av øðrum áhugamálum, eitt nú kommunalum áhugamálum.

LANDSVERK

**Landsverk skal góðkenna**

Í uppskotinum verður nevnt, at Landsverk skal góðkenna fyrireikingarnar og forprosjekteringsarbeiðið. Til hetta kann viðmerkjast, at tað kann vera trupult at fáa eitt partafelag at planleggja eftir heildini og ikki at velja loysnina, sum er mest optimal fíggjarliga beint í løtuni. Sum dømi kann nevnast tunnilsmunnin til Sandoyartunnilin á Gomlurætt, har tað verður neyðugt einaferð í framtíðini at gera ein nýggjan atkomuveg.

Vinaliga

Ewald Kjølbro
Stjóri

Tinghúsvegur 5 // Postsmoga 78 // FO-110 Tórshavn // Tel. +298 340 800 // lv@lv.fo // www.landsverk.fo